# **Smákonfirmantar í Havnar kirkju**

Eftir summarferiuna byrja vit við smákonfirmantum í Havnar kirkju.

Øll børn, sum byrja í 4. flokki, eru vælkomin at vera við. :-)

Vit hittast í kirkjuni týsdagar kl. 14.00 - 15.00.

Byrjað verður við saft og ábit, og síðan fara vit í gongd við undirvísingina.

Vit hoyra bíbliusøgu, syngja sálmar, skriva bønir, læra um kirkjuna og gudstænastuna, gera ymiskt kreativt,
og so enda vit við eini familjugudstænastu,
har smákonfirmantarnir luttaka.

Vit hittast fyrstu ferð 20. august og hava sjey undirvísingarferðir. Seinasta undirvísing er 1. oktobur, og familjugudstænastan er sunnudagin, 6. oktobur kl. 11.00.

*Hetta er fyrstu ferð vit hava smákonfirmantar í Havnar kirkju og vit gleða okkum so nógv. Tað er ein góður máti hjá børnunum at kunnast við kirkjuna, samstundis sum tey læra bíbliusøgur og sálmar.*

Melda til á havnar@kirkja.fo
Viðmerk fulla navn á barnið og telefonnummar hjá einum foreldri/verja.

Vit eru so spentar :-)

Bestu heilsur

Anne Mette Greve Klemensen og Steintóra G. Joensen

Sóknarprestar í Havnar kirkju og í Nólsoyar kirkju